# Vágs Kommuna í nýggj høli

**Talan er um eitt gerðabýti millum Vágs Kommunu og almennu myndugleikarnar, ið býta um skrivstovubygningar í Vági. Brúkaraumboðsmaðurin og eftirlitisfólk til alivinnuna flyta í hølini hjá Vágs Kommunu og kommunan flytir, har Miðnámsskúlin helt til**




KOMMUNUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Miðnámsskúlin er fluttur úr Vági, og Mentamálaráðið hevur boðað frá, at ikki er brúk fyri húsinum, har skúlin helt til.

Vinnumálaráðið hevur sett brúkaraumboðsmann og eftirlit við alivinnuni. Talan er ikki um so nógv starvsfólk, og tí er hugskotið komið um, at Vágs Kommuna og almennu stovnarnir býta um hølir. Vágs Kommuna sigur soleiðis á síni heimasíðu:

Vágs kommuna hevur víst bygninginum áhuga, og hevur Mentamálaráðið skotið upp eitt gerðabýti, soleiðis at býráðið í eitt ávíst áramál ókeypis fær brúksrættin til bygningin, og at Vinnumálaráðið sama áramál ókeypis fær brúksrættin til verandi skrivstovuhølir, ið býráðsskrivstovan húsast í.

Mentamálaráðið letur býráðnum brúksrættin til ognina undir ávísum treytum:

- býráðið yvirtekur allan rakstrar- og viðlíkahaldskostnaðin av ognini
- Landsverk hevur eftirlit og átalurætt um nýtsluna og røktina av ognini
- Landsverk skal góðkenna allar møguligar broytingar av húsinum, áðrenn hesar verða framdar.
- Vágs býráð fær forkeypsrætt til ognina.

Líknandi treytir um kommunskrivstovuna eru settar Vinnumálaráðnum:

Vinnumálaráðið yvirtekur allan rakstrar- og viðlíkahaldskostnað av ognini.

Vágs kommuna kemur at hava eftirlit og átalurætt um nýtsluna og røktina av ognini.

Vágs kommuna skal góðkenna allar møguligar broytingar av húsinum, áðrenn hesar verða framdar, skrivar Vágs Kommuna á síni heimasíðu.

Vágs Kommuna letur í dag upp í nýggju hølunum, har Miðnámsskúlin helt til. Hesin bygningur verður eisini róptur Gamla Posthús.

# Mótmæli frá foreldrum í Klaksvík ímóti at flyta frítíðarskúlan

Foreldur at verandi børnum og komandi børnum í frítíðarskúlanum, Sornhúsið, vilja hervið gera vart við okkara misnøgd við avgerðina um at flyta frítíðarskúlan út í Húsið.

Á fundi millum foreldur í Sornhúsinum týskvøldið 12. mei varð hetta málið umrøtt. Full semja var á fundinum um, at avgerðin at flyta frítíðarskúlan er ikki nóg væl umhugsað, og ilt er at fáa eyga á sparingina, sum hevur verið førd fram sum grundgeving fyri avgerðini. Harafturat ørkymlar tað okkum enn meiri, at talan er um eina fyribilsloysn.

Og vit seta stórt spurnartekin við trygdina hjá okkara børnum, tá tey skulu ganga frá skúla til frítíðarskúla eftir Klaksvíksvegnum, har mest ferðsla er í býnum. Harafturat skal havast í huga, at flestu børn hava eitt hvørt frítíðarítriv, sum er í nærumhvørvinum, har Sornhúsið nú húsast.

Útfrá verandi upplýsingum er tað púra greitt fyri okkum, at trivnaðurin í frítíðarskúlanum eftir flytingina verður munandi skerdur. Sparingin er ivasom, og trygdin verður verri, tí farleiðin út í Húsið kann als ikki samanberast við farleiðina til Bøgøtu.

Vit skilja als ikki, at stovnsleiðarar og vit ikki eru tikin við upp á ráð í hesi tilgongd. Eisini tá hugsað verður um, at tað eru ymiskir aldursbólkar, sum upp á ymiskar fortreytir eftir ætlan koma at húsast undir somu lon.

Um einasta grundgeving er fíggjarliga sparingin, vilja vit spyrja, um myndugleikarnir hava tikið hædd fyri møguleikanum at hækka mánaðargjaldið og/ella lækka húsaleiguna í Bøgøtu, áðrenn avgerðin varð tikin?

Hetta brævið verður latið Sosialu nevnd í býráðnum, so tað kann koma við á nevndarfund í dag, tann 13. mei. Og fríggjadagin 15. mei verða undirskriftir frá foreldrunum handaðar Gunvá við Keldu, borgarstjóra.

Vit vilja inniliga heita á politiska og umsitingarliga myndugleikan at endurskoða avgerðina, sum er tikin, soleiðis at børn okkara kunnu húsast í tryggu og vælvirkandi karmunum í Sornhúsinum í Bøgøtu.

*Vegna foreldur í frítíðarskúlanum, Sornhúsið*
*Súsanna Lydersen,*
*Solby Eliasen,*

# Vinafelag fingið heimasíðu

Føroyskt Hetlendskt Vinafelag hevur fingið heimasíðu. Vinafelagið virkar fyri samstarvi og vinalagi millum Føroyar og Hetland. Felagið skal eisini kunna felagslimir og føroyingar annars við hetlendsk viðurskifti. Heimasíðan er liður í hesum kunningararbeiði. Á síðuni eru upplýsingar um felagið, myndir og tíðindi.

Heimasíðan hevur heitið: www.faroe-shetland.org.

Føroyskt Hetlendskt Vinafelag fer til heystar og komandi vetur at skipa fyri kunning og fyrilestrum um Hetland, og roynt verður at skipa fyri ferðum til Hetlands komandi ár, hóast ferðasambandið ikki longur er tað besta.

Vinafelagið hevur áður gjørt vart við, at tað er stórt spell, at gott ferðasamband millum Føroyar og Hetland ikki er longur, tí tað hevur altíð verið gott samband millum føroyingar og hetlendingar. Hetland er ein av okkara næstu grannatjóðum og er áhugavert ferðamannaland, við ríkari søgu, náttúru og mentan.

Nýggir limir eru vælkomnir at tekna seg í Føroyskt Hetlendskt Vinafelag hjá einum av nevndarlimunum.

# Hans Engell í Miðlahúsinum Kristi himmalferðardag

TÍÐINDASKRIV
*Demokratia*

Hvussu sær politiska landslagið í Danmark út eftir forsætisráðharra-skiftið? Hvørji eru tey mest átrokandi málini fyri nýggja javnstøðuráðharran í Danmark? Og hvørji tiltøk kunnu setast í verk fyri at fremja javnstøðu?

Hesar og aðrar spurningar fer Hans Engell, fyrrverandi politikari og blaðstjóri í Danmark, at viðgera í Miðlahúsinum í Havn Kristi himmalferðardag.

Tað er Demokratia, sum skipar fyri tiltakinum, hvørs endamál er at økja um áhugan fyri spurningum, sum viðvíkja øktari javnstøðu í politikki.

Hans Engell hevur verið fólkatingslimur, løgmálaráðharri í stjórnini hjá Poul Schluter og seinni løgmálaráðharri. Eisini var hann leiðari í Konservativa Fólkaflokkinum frá 1993 til 1997. Frá 2000 til 2007 var hann blaðstjóri á Ekstrablaðnum.

Høvi verður hjá áhoyrarunum at seta spurningar.

Rigmor Dam, blaðkvinna, verður orðstýrari.

Hans Engell gleðir seg til tiltakið í Miðlahúsinum og vónar at fáa nógvar spurningar um politikk og um javnstøðu.

Tiltakið, sum er alment og ókeypis, verður í Miðlahúsinum í Havn Kristi himmalferðardag, tað er hósdagin 21. mai klokkan 19.30.

